








# Handilsavtalan við russar í bíðistøðu

**Eftir drúgvar samráðingar, sum endaðu við, at ein avtala varð orðað, er ein komandi handilsavtala tó set í bíðistøðu. Umsitingarligir- og málsligir tvørleikar hava ávirkað samráðingarnar. Talan er um brot á altjóða siðvenju, metir fulltrúi í Vinnumálastýrinum**

HANDILSAVTALA
*Heri á Rógvi*



*Ein føroysk innrás í Russlandi við Anfinni Kallsberg á odda er fyribils sett av skránni. Tann ætlaði handilssáttmálin mátti dvína fyri stóru og tvørligu umsitingini í Russlandi*

Sum støðan er nú, so er eingin handilssáttmáli millum Føroyar og Russland. Samstarvið er tó ikki verri enn so, at vit hava eina fiskivinnuavtalu við russar. Skip úr Russlandi teljast eisini millum tey mest vitjandi í føroyskum sjógvi. Yvir eitt áramál hava russiskir og føroyskir myndugleikar samráðst um eina handilsavtalu landanna millum. Fleiri ferðir hava embætis fólk úr báðum londum verið á vitjan hjá hvørjum øðrum.

Føroyingar hava samráðst í góðari trúgv um eina MFN-avtalu. Ein MFN-avtala er ein stytting fyri eina Most Favoured Nation avtalu. Hetta er at meta sum tað tættasta tú kemur upp at einari fríhandilsavtalu. MFN er eitt hugtak, ið WTO, World Trade Organisation, hevur ásett. WTO hevur ásetingar, ið siga, at øll WTO limalond hava somu sømdir – nevniliga somu sømdir sum tað landi, sum fær bestu sømdir. Talan er tó bert um eina meginreglu. Londini kunnu framvegis gera fríhandilssáttmálar. Russar eru tó ikki limir í WTO. Tískil hevði ein MFN-avtala við russar givið Føroyum í minsta lagi eins góðar treytir sum okkara »kappingarneytar«, hvat viðvíkur marknaðaratgongd.

Í MFN-avtaluni við russar verður lægsti tollur ásettur, men talan er tó ikki um eina fríhandilsavtalu.

Samráðingarnar hava sum so gingið rættiliga væl. Í fjør summar kundu samráðingarleiðarnir staðfesta, at teir vóru samdir um ein tekst. Føroyski samráðingarleiðarin var Herluf Sigvaldsson, leiðari fyri uttanlandsdeildina hjá løgmansskrivstovuni. Hann kundi staðfesta, at partarnir vóru samdir um tekst. Alt skuldi sostatt verið komið í rættlag. Bert undirskriftirnar frá løgmanni og russiskum starvsbróðuri vantaðu.

Men umsitingin í Russlandi er ikki so at hava við at gera. Samráðingarnevndin kundi ikki bert uttan víðari góðkenna tekstin. Teksturin skuldi umsetast bæði til russiskt og aftur til enskt, og leiðin gekk framvið nógvum skrivaraborðum. Tá teksturin kom aftur til føroyingar, var hann munandi broyttur. So mikið, at løgmaður ikki kundi seta sínar krullir á pappírið í hesum umgangi.

Sambært Gunnari Holm-Jacobsen, fulltrúa í Vinnumálastýrinum, sum eisini var við í samráðingarnevndini, kemur tað mestsum ikki fyri, at ein sáttmálatekstur verður broyttur eftir at samráðingarleiðarnir hava staðfest sáttmálan. Gunnar Holm-Jacobsen metir hetta vera brot á altjóða siðvenju.

Tað var ætlanin, at løgmaður við fylgi skuldi fara til Russlands í hesum mánaðinum at skriva undir, men hetta verður tó av ongum.

### Vónar

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, harmast um, at eingin sáttmáli við russar gjørdist til veruleika á hesum sinni. Hann varðveitur tó vónina um, at ein sáttmáli verður undirskrivaður, áðrenn summari kemur – kanska longu í vár, heldur løgmaður fyri.

Anfinn Kallsberg sigur, at hann sum so var til reiðar at fara avstað fyri at undirskriva. Hann skuldi hava eitt fylgi við sær, sum umframt embætisfólk eisini skuldu innihalda umboð fyri føroyska vinnulívið.

Øll segl eru sett fyri at loysa fløkjuna við russar. Bæði Anders Fogh Rasmussen og danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, eru kunnaðir um málið, og teir gera sambært løgmanni sítt fyri at fáa útgreina tað soleiðis, at ein sáttmáli kann gerast veruleiki innan langa tíð.

Løgmaður sigur seg ásanna, at tann politiska umsitingin í Russlandi er tung at fáast við, men hann varðveitur tó vónina.

# Sambandslistin í Eysturoynni mannaður

**Ein blandingur av nýggjum og eldri kreftum eru á valevnalistanum hjá Sambandsflokkinum í Eysturoynni**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Eysturoyggin hevur leingi verið kend sum eitt av teimum valdømunum, har Sambandsflokkurin vanliga plagar at klára seg væl. Sambandsfólk í oynni hava nú mannað valevnalistan hjá teimum til komandi løgtingsval.

Átta nøvn standa á listanum, harav fýra hava ikki verið uppstillaði áður. Hini fýra á listanum teljast tó millum tann meira royndu politikararnar í landinum. Veteranurin Jákup E. Lamhauge stillar uppaftur hesaferð saman við so kendum monnum sum Edmund Joensen, Alfred Olsen og Atla Hansen.

Hini fýra, Edva Jacobsen, Fuglafjørður, Tummas Eli Høj Joensen, Strendur, Marja Lamhauge, Lambareiði, Reimund Langgaard, Leirvík, eru øll nýggj í landspolitikki. Edva Jacobsen stillaði upp til Fólkatingsvalið fyri Sambandsflokkin.

Fyrrverandi løgtings- og fólkatingsmaðurin Johannes Martin Olsen stillar ikki upp hesaferð.

Við seinasta løgtingsval fekk Sambandsflokkurin 1.533 atkvøður í Eysturoynni, og tveir tingmenn valdar.

Løgtingsval verður mest sannlíkt 30. apríl.






Bjarni Djurholm, landsstýrismaður:

# – Punktgjøldini eru ótíðarhóskandi

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, legði í fjør uppskotið um at avtaka punktgjøldini fram á landsstýrisfundi. Grundgevingarnar vóru tær, at vørur, sum eru gerandisvørur, kunnu ikki verða roknaðar fyri luksusvørur, og skulu tí ikki tollast hareftir**

PUNKTGJALD
*Ingrid Bjarnastein*

– Áhugafelagið hjá Elinnleggjarum í Tórshavn vendi sær til mín í fjør vár, har gjørt varð vart við órímiligheitina í ásetanina í sambandi við luksustoll, ella punktgjøld, greiðir Bjarni Djurholm frá.

- Eg tók undir við hesum málinum, og tað varð eisini kannað í Vinnumálastýrinum. Men tollur er fíggjarmál ikki vinnumál, og tí sendi eg eitt tilmæli til Fíggjarmálastýrið um avtøku av punktgjøldum. Í tilmælinum til Fíggjarmálastýrið gjørdi eg vart við, at spart verður uppá íløgur til ljós, og harvið verður trygdin ikki sum hon skal. Punktgjøldini økja eisini um ólógliga innflutningin, og hetta verður heldur ikki eins umsitið kring landið. Eisini varð gjørt vart við, at hesin luksustollur er ótíðarhóskandi, serliga á vørum, sum eru gerandisvørur, og tí skulu vørurnar heldur ikki verða tollaðar hareftir.

Bjarni Djurholm sigur eisini, at skipanin skal vera so einføld sum møguligt, so tað verður léttari at umsita, og hetta gevur eisini stabilitet.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum heldur, at punktgjøldini eru ótíðarhóskandi*

Uppskotið varð eisini lagt fram á landsstýrisfundi, har tað síðani varð sent víðari til Fíggjarmálastýrið. Áhugafelagið vendi sær síðani aftur til Bjarna Djurholm í desember mánaða í fjør, og 5. januar í ár vendi landsstýrismaðurin í vinnumálum sær enn einaferð til Fíggjarmálstýrið fyri at vita, hvussu langt hetta málið var komið. Men Fíggjarmálastýrið hevur ikki tikið tilmælið til eftirtektar, í øllum førum ikki enn.

Punktgjøldini:

# Ein leivd frá gamlari tíð

**Í seinastuni hevur nógv at verið hoyrt um orkusparing og punktgjøld. Tað vísir seg, at føroyingar eru ikki nóg umhvørvistilvitaðir, tí hugsað verður meira um pengapungin enn um umhvørvið tá keypt verður**

PUNKTGJALD
*Ingrid Bjarnastein*



*Rasmus Magnussen, formaður í Áhugafelagnum hjá elinnleggjarum í Havn, greiddi hósdagin frá um punktgjøldini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Áhugafelagið hjá Elinnleggjarum í Tórshavn hevði hósdagin tíðindafund, har gjørt varð vart við sokallaða orku- og umhvørvispolitikkin í Føroyum, sum eftir øllum at døma liggur goymdur burtur í eini lítlari skuffu onkrastaðni langt vekk, og harvið als ikki er til fyri tann vanliga føroyingin.

Punktgjøld, ella luksusgjald, sum tað eisini verður kallað, er eitt gjald, ið verður lagt afturat el-lutum. 20% eyka verða løgd afturat tá brúkarin í Føroyum skal keypa sær eitt kuldaskáp, eina sentrifugu, uppvaskimaskinu og líknandi. Um tú ynskir tær eitt sjónvarp, videotól ella kassettuspælara, skalt tú hava í huga, at í prísinum tú ert tilreiðar at gjalda liggja 30% eyka.

Tað tykist ógvuliga løgið, at í einum samfelagi, har kuldaskáp, uppvaskimaskinur, sjónvarp, videotól og kassettuspælari er hvønnmansogn, skal vera sett eitt gjald á, ið verður kallað luksusgjald. Hvat er so luksus við nøkrum, sum øll eiga?

### 40% dýrari enn í Danmark

Áhugafelagið hjá Elinnleggjarum í Tórshavn hevur síðani 1996 arbeitt við at fáa punktgjaldið avtikið. Talan er um nógvar 17 vøruflokkar, sum áhugafelagið vil hava avtiknar, men um Fíggjarmálastýrið og Tollstovan ikki ganga hesum tilmæli á møti, mælir áhugafelagið til at taka punktgjaldið av lampum og ljósrørum. Føroyingar kunnu ikki so frægt sum keypa sær eitt stearinljós uttan 30% verða løgd afturat.

– Punktgjøldini hava við sær, at føroyingar velja heldur at keypa vøruna í Danmark og síðani "smuggla" hana inn til Føroya, sigur Rasmus Magnussen, formaður í Áhugafelagnum hjá Elinnleggjarum í Tórshavn.

– Men tað er heldur ikki so løgið, at føroyingar velja hesa loysnina, tí hví keypa eina lampu fyri 1700 krónur í Føroyum, tá tú hevði kunnað fingið hana fyri 1000 krónur í Danmark? Punktgjøldini eru ein leivd frá gamlari tíð, áðrenn MVG´ið kom.

### Punktgjald til land, men ikki sjógv

Nógv dømi vórðu tikin fram um punktgjøldini, og nógv teirra kundu tykjast ikki sørt løgin. Um ein ljóskastari á kaiini lýsti út á sjógvin, var onki punktgjald á peruni, men um ljóskastarin varð snaraður 180 stig, soleiðis at hann nú lýsti inn ímóti landi, hevði peran kostað meira. Ert tú ein alifiskur fært tú ljós uttan punktgjald, men um tú ert ein kúgv, skal punktgjaldið leggjast afturat.

– Ein annar vansi við punktgjøldunum er, at elhandlar í Føroyum als ikki kunnu nýta donsk lýsingahefti. Tað kunnu til dømis búnýtishandlar gera, tí onki avgjald er á teirra vørum. Heldur ikki møbilhandlar hava avjglad á sínum vørum. Tú sleppur at sita uttan avgjald, men um tú skalt hava rætta belýsningin, skalt tú gjalda eyka, sigur Rasmus Magnussen.

### Kunnu spara millíónir

Eitt lítið roknistykki varð eisini lagt fram á tíðindafundinum í gjár. Í stuttum sigur tað so nógv sum tað, at um 1000 húsarhald í Føroyum keypa 10 lágorkuperur, verða 6,46 mió. krónur spardar í orkunýtslu.

– Ógvuliga umráðandi er, at tú hevur tann rætta belýsningin. Í Danmark hava tey eitt, sum eitur Dansk Standard 700, sum millum annað sigur, at tað er ikki loyvi at brúka tey sokallaðu "kjallara-ljósini" á plássum har fólk dagliga skulu vera. Dansk Standard 700 er eisini galdandi í Føroyum, bara ikki tá tað kemur til pening. Í londunum rundan um okkum hava øll uppdagað, at tað er nakað, ið eitur renovering av til dømis skúlum. Har eru øll amaturini skift út, og betri orkusparandi amatur sett inn, soleiðis at skúlin harvið eisini fær rætta belýsningin. Tá tú skalt sita í skeivum belýsningi dagin langan, førir tað við sær, at tú fært høvuðpínu og missir konsentratiónsevnini, sigur Rasmus Magnussen.

Fólk vilja ikki keypa lágorkuperur fyri 130 krónur, tá tey kunnu fáa eina vanliga peru fyri 10 krónur. Føroyingar hava rætt og slætt ikki ráð at spara.

### Onki komið burturúr

Hóast tað hevur verið arbeitt við at fáa punktgjøldini avtikin síðani 1996, er framvegis onki komið burturúr. Vinnumálastýrið hevur mælt Fíggjarmálastýrinum til at avtaka punktgjøldini, men síðani 25. mei 2001, tá seinasti fundurin var, hevur onki verið at frætta frá Fíggjarmálastýrinum.

Nú hevur áhugafelagið valt at fara í fjølmiðlarnar við tilfarinum soleiðis, at Føroya fólk eisini kann verða kunnað um orkusparing og orkupolitikk sum heild.

Hugsa um tað næstu ferð, tá tú setur teg í djúpa lenistólin við eini góðari bók. Stólurin tú situr í er uttan avgjald, meðan ljósið tú hevur tørv á fyri at lesa bókina, hevur eitt punktgjald, sum ger tað dýrari at verða upplýstur enn tað er at sita.